# Gerðabók – Býráðsfundur 10/2020 – hildin á Hellunum

**Dagfesting:** 26.11.2020 kl. 19:00
**Málnr.:**

Nevndarlimir:: Sonni á Horni, Eivin Breiðaskarð, Kristian Petersen, Edva Jacobsen, Eyðun á Lakjuni, Árant Berjastein, Magni Jøkladal, Ólavur Larsen og Sigurð Simonsen

Vara limir:

Ikki møtt:

Nevndarskrivari: Henrik Weihe Joensen, kommunustjóri

| **Málsyvirlit** | | | **Síða** |
|---|---|---|---|
| 10/20 | 20/00081-6 | Umbøn um eykajáttan til Nánd fyri 2020 | 2 |
| 11/20 | 20/00127-8 | Umbøn um eykajáttan í sambandi við innrætting av nýggja býráðshúsinum | 4 |
| 12/20 | 20/00546-5 | Uppskot til fíggjarætlan fyri Nánd 2021 | 7 |
| 13/20 | 20/00563-2 | Uppskot til fíggjarætlan hjá barnaverndartænastuni fyri 2021 | 9 |
| 14/20 | 20/00058 | Fíggjarætlan hjá Fuglafjarðar kommunu fyri 2021 | 11 |

**10/20**
**20/00081-6 Umbøn um eykajáttan til Nánd fyri 2020**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 20.10.2020 | 10/20 |
| 2 Býráðið | 29.10.2020 | 7/20 |
| 3 Fíggjarnevndin | 18.11.2020 | 16/20 |
| 4 Býráðið | 26.11.2020 | 10/20 |

## Tilráðing

<table>
<tr><td>Til viðgerðar í</td><td colspan="3">Fíggjarnevndini</td></tr>
<tr><td>Stutt lýsing</td><td colspan="3">Stýrið fyri Nánd samtykti tann 14. februar í ár fíggjarætlanina fyri 2020, har samlaða nettoútreiðslan verður kr. 40.484.813,00, harav verður gjaldið frá Fuglafjarðar kommunu kr. 19.451.972,00.<br><br>Í fíggjarætlanini hjá Fuglafjarðar kommunu fyri 2020 eru á rakstrarstaði 285, konto 7140-00, avsettar 19. mió. kr. til Nánd. Tað mangla sostatt kr. 451.972,- í fyri at rinda kommununar part av rakstrinum av eldraøkinum fyri 2020. Fíggjarnevndin hevur á fundi 18. februar í ár samtykt, at mæla býráðnum til at taka undir við fíggjarætlanini hjá stýrinum fyri Nánd fyri 2020. Á fundi 21 apríl í ár samtykti fíggjarnevndin, at útseta viðgerðina av hesi eykajáttan til seinni í ár.<br><br>Eykajáttanin kann fíggjast av gjaldførinum hjá Fuglafjarðar kommunu.<br><br>Samsvarandi kommunustýrislógini § 41, stk. 2 skal umbønin um eykajáttan viðgerast á tveimum býráðsfundum við í minsta lagi 14 daga millumbili.</td></tr>
<tr><td>Bakgrund</td><td colspan="3">Raksturin av eldraøkinum Nánd varð dýrari enn Fuglafjarðar býráð metti í fíggjarætlan kommununar fyri 2020.</td></tr>
<tr><td>Grundarlag</td><td colspan="3">• Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt<br>Kommunustýrislógin, fíggjarætlanin<br>• Møgulig fylgiskjøl<br>Skriv, dagfest 31. januar 2020, um fíggjarætlanina hjá Nánd fyri 2020<br>Skriv, dagfest 21. apríl 2020, um fíggjarætlanina hjá Nánd fyri 2020</td></tr>
<tr><td colspan="4" align="center">Viðgerð</td></tr>
<tr><td rowspan="3">Tekstur íð lýsir loysn</td><td>Avleiðingar</td><td>Stuttíðar</td><td>Langtíðar</td></tr>
<tr><td>Fíggjarligar</td><td>Ja</td><td>Ja</td></tr>
<tr><td>Umsitingarligar</td><td>Ja</td><td>Ja</td></tr>
<tr><td>Tilmæli</td><td colspan="3">Borgarstjóri, kommunustjóri og fíggjarleiðari mæla til, at ein eykajáttan á kr. 451.972,- verður veitt soleiðis at Fuglafjarðar kommuna kann gjalda sín part av rakstrinum viðvíkjandi eldrasamstarvinum Nánd.</td></tr>
<tr><td>Dagf</td><td colspan="3">16/10-2020</td></tr>
</table>

**Fíggjarnevndin 20. oktober 2020**
Fíggjarnevndin samtykti einmælt eykajáttanina á kr. 451.972,- til raksturin av Nánd.

**Býráðið 29. oktober 2020**
Býráðið samtykti einmælt, at fylgja tilmælinum frá fíggjarnevndini, og beina málið til 2. viðgerð.

**Fíggjarnevndin 18. november 2020**
Fíggjarnevndin samtykti einmælt, at mæla býráðnum til at samtykkja 2 viðgerð av eykajáttanini til Nánd fyri 2021

**Býráðið 26. november 2020**
Býráðið samtykti einmælt (9-0) við 2. viðgerð, at góðkenna eykajáttanina til raksturin av Nánd fyri 2020.

## 11/20
## 20/00127-8 Umbøn um eykajáttan í sambandi við innrætting av nýggja býráðshúsinum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 20.10.2020 | 8/20 |
| 2 Býráðið | 29.10.2020 | 6/20 |
| 3 Fíggjarnevndin | 18.11.2020 | 15/20 |
| 4 Býráðið | 26.11.2020 | 11/20 |

### Tilráðing

| Til viðgerðar í | Fíggjarnevndini |
|---|---|
| Stutt lýsing | Í sambandi við at fyrisitingin hjá Fuglafjarðar kommunu flytir úr verandi bygningi á Ennivegi, tí har er staðfestur blámusoppur, hevur tekniska deild gjørt uppskot til fyribils innrætting av nýggja býráðshúsinum, sum kommunan hevur keypt frá Eik-Banka, til skrivstovuhølir hjá fyrisitingini umframt býráðssal. 5 starvsfólk fara í fyrsta umfari at halda til í nýggja býráðshúsinum. Uppskotið hjá teknisku deild er í trá við uppskot 6 (D1) hjá Arkitektum 99, ið hava verið inni í myndini í sambandi við fyrireiking av innrættingini.<br><br>Innrætting til skrivstovuhøli er eisini gjørd í hølini hjá «Bassa», har Framherji nýliga hevur hildið til, tí pláss er ikki fyri øllum starvsfólkum í nýggja býráðshúsinum. Fuglafjarðar kommuna leigar fyribils hølini frá Bassa, har 6 starvsfólk fara at halda til.<br><br>Tilgongdin í mun til innrætting og innbúgv er farin fram í samráði við starvsfólkini.<br><br>Tað er neyðugt við einari eykajáttan á kr. 2.280.000,- v/mvg í sambandi við innrættingina av nevndu hølum, sí kostnaðarmeting í notati, dagfest 9. oktober 2020, sum liggur við málinum. |

| | |
|---|---|
| | Hetta er fyrsta viðgerð av umbøn um eykajáttan í sambandi við innrætting av nýggja býráðshúsinum. Samsvarandi kommunustýrislógini § 41, stk. 2 skal eykajáttanin viðgerast av býráðnum tvær ferðir við í minsta lagi 14 dagar millumbili. Eykajáttanin verður fíggjað av gjaldførinum. |
| Bakgrund | Staðfestur blámusoppur í verandi hølum á kommunuskrivstovuni, Ennivegur 38 í Fuglafirði. |
| Grundarlag | Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tilíkt<br>• **Kommunustýrislóg, Arbeiðsumhvørvislóg**<br>Møgulig fylgiskjøl<br>• **Notat, dagfest 9. oktober 2020, kostnaðarmeting og frágreiðing í mun til hana**<br>• **Flatmynd av hølum í nýggja býráðshúsinum**<br>• **Flatmynd av hølum hjá Bassa**<br>• **Fundarfrágreiðing, dagfest 25. september 2020**<br>• **Uppskot D1 hjá Arkitektum 99** |
| Viðgerð | |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | Ja | Ja |
| | Umsitingarligar | Ja | Ja |

| | |
|---|---|
| Tilmæli | Fyrisitingin hjá Fuglafjarðar kommunu mælir til, at taka undir við uppskotinum frá teknisku deild til innrætting av nevndu hølum og at samtykkja eina eykajáttan á kr. 2.280.000,- v/mvg í hesum sambandi. |
| Dagf | 16/10-2020 |

**Fíggjarnevndin 20. oktober 2020**
Fíggjarnevndin varð kunnað um status viðvíkjandi innflyting í hølini hjá ávíkavist «Bassa» og Eik-bygningin mánaðarskiftið oktober/november og november/desember. Fíggjarnevndin samtykti einmælt eina eykajáttan á kr. 2.280.000 v/mvg.

**Býráðið 29. oktober 2020**
Býráðið samtykti, at fylgja tilmælinum frá Vinnu- og havnanevndini, at skipað eitt móttøkupláss á Kambsdali og at borgarar á Kambsdali í hesum sambandi verða væl kunnaðir (5-3-1). Sonni á Horni, Kristian Petersen, Eivin Breiðaskarð Ólavur Larsen og Magni Jøkladal tóku undir við málinum. Sigurð S. Simonsen, Eyðun á Lakjuni og Edva Jacobsen atkvøddu ímóti. Árant Berjastein atkvøddi blankt.

**Fíggjarnevndin 18. november 2020**
Figgjarnevndin samtykti einmælt, at mæla býráðnum til at samtykkja eykajáttanina við 2. viðgerð.

**Fíggjarnevndin 18. november 2020**
Fíggjarnevndin samtykti einmælt, at mæla býráðnum til at samtykkja eykajáttanina við 2. viðgerð.

**Býráðið 26. november 2020**
Býráðið samtykti við 2. viðgerð (8-1), at góðkenna eykajáttanina til innrætting av nýggja býráðshúsinum. Sonni á Horni, Ólavur Larsen, Eivin Breiðaskarð, Kristian Petersen, Magni Jøkladal, Edva Jacobsen, Eyðun á Lakjuni og Árant Berjastein tóku undir við at góðkenna eykajáttanina. Sigurð Simonsen atkvøddi ímóti.

## 12/20
## 20/00546-5 Uppskot til fíggjarætlan fyri Nánd 2021

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 18.11.2020 | 13/20 |
| 2 Býráðið | 26.11.2020 | 12/20 |

### Tilráðing

| Til viðgerðar í | Fíggjarnevndini | | |
|---|---|---|---|
| Stutt lýsing | Nánd hevur sent uppskot til fíggjarætlan fyri 2021 til Fuglafjarðar býráð til góðkenningar. Uppskotið leggur upp til, at Fuglafjarðar kommuna skal gjalda kr. 20.931.214,- komandi ár í mun til kr. 19.451.972,- í 2020. Ein hækking í gjaldinum á kr. 1.479.242,-<br><br>Hækkingin í gjaldinum stavar frá ymsum viðurskiftum, sum eru nevnd undir pkt. 3 í hjáløgdu frágreiðing frá stýrisfundi í Nánd, dagfest 9. november 2020.<br><br>Afturberingin frá landinum til Fuglafjarðar kommunu í sambandi við raksturin av Nánd var í fjør umleið 16. mió. kr. Tað vil siga, at núverandi meirkostnaður hjá Fuglafjarðar kommunu av eldrasamstarvinum fer upp um 4. mió. kr.<br><br>Settar eru 1. mió. kr. av í leiguinntøkum í fíggjarætlanini fyri 2021 í sambandi við eldrasamstarvið Nánd. | | |
| Bakgrund | Góðkenning av fíggjarætlanini hjá Nánd | | |
| Grundarlag | • Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt<br>**Kommunustýrislógin**<br>**Lóg um kommunalt samstarv um heimatænastu, eldrarøkt v.m.**<br>**Fíggjarætlan 2021**<br>• Møgulig fylgiskjøl<br>**Uppskot til fíggjarætlan fyri Nánd 2021**<br>**Frágreiðing frá fundi við leiðaran á Nánd, Poulu Reinert Petersen, dagfest 26. oktober 2020**<br>**Frásøgn frá stýrisfundi í Nánd, dagfest 9. november 2020** | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur ið lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | Ja | Ja |
| | Umsitingarligar | Ja | Ja |
| Tilmæli | Fyrisitingin mælir til, at fíggjarnevndin og býráðið tekur undir við uppskoti til fíggjarætlan fyri Nánd 2021. | | |
| Dagf | 17/11-2021 | | |

**Fíggjarnevndin 18. november 2020**
Fíggjarnevndin samtykti einmælt, at mæla býráðnum til at góðkenna fíggjarætlanina hjá Nánd fyri 2021 við tí treyt, at meirútreiðslurnar fyri leigu í sambandi við nýbygging av Vesturstovu verður innroknaðar í fíggjarætlanina fyri 2021.

**Fíggjarnevndin 18. november 2020**
Fíggjarnevndin samtykti einmælt, at mæla býráðnum til at góðkenna fíggjarætlanina hjá Nánd fyri 2021 við tí treyt, at meirútreiðslurnar fyri leigu í sambandi við nýbygging av Vesturstovu verður innroknaðar í fíggjarætlanina fyri 2021.

**Býráðið 26. november 2020**
Býráðið samtykti einmælt (9-0), at fylgja tilmælinum frá fíggjarnevndini, og góðkenna fíggjarætlanina hjá Nánd fyri 2021.

## 13/20
## 20/00563-2 Uppskot til fíggjarætlan hjá barnaverndartænastuni fyri 2021

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 18.11.2020 | 14/20 |
| 2 Býráðið | 26.11.2020 | 13/20 |

**Tilráðing**

| Til viðgerðar í | Fíggjarnevndini | | |
|---|---|---|---|
| Stutt lýsing | Leiðarin á barnaverndartænastuni, Ingi Hansen, hevur sent býráðnum uppskot til fíggjarætlan fyri 2021 til góðkenningar. Fíggjarætlanin fyri barnaverndartænastuna er á kr. 4.314.000,- har skal Fuglafjarðar kommuna gjalda kr. 1.827.600,- sum er sama upphædd, ið varð sett av á fíggjarætlanini í fjør.<br><br>Raksturin av barnaverndartænastuni hevði í 2019 ein meirkostnað fyri Fuglafjarðar kommunu á 151 tús. kr. | | |
| Bakgrund | Góðkenning av fíggjarætlanini hjá barnaverndartænastuni fyri 2021 | | |
| Grundarlag | • Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tilíkt<br>**Kommunustýrislógin**<br>**Barnaverndarlógin**<br>• Møgulig fylgiskjøl<br>**Uppskot til fíggjarætlan hjá barnaverndartænastuni fyri 2021** | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur ið lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | Ja | Ja |
| | Umsitingarligar | Ja | Ja |
| Tilmæli | Fyrisitingin mælir til, at fíggjarnevndin tekur undir við fyriliggjandi uppskoti til fíggjarætlan hjá barnaverndartænastuni fyri 2021. | | |
| Dagf | 17/11-2020 | | |

**Fíggjarnevndin 18. november 2020**
Fíggjarnevndin samtykti einmælt, at mæla býraðnum til at samtykkja fíggjarætlanina hjá barnaverndartænastuni fyri 2021.

**Býráðið 26. november 2020**
Býráðið samtykti einmælt (9-0), at fylgja tilmælinum frá fíggjarnevndini, og góðkenna fíggjarætlanina hjá Barnaverndartænastuni fyri 2021.

**14/20**
**20/00058-6 Fíggjarætlan 2021**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 11.11.2020 | 12/20 |
| 2 Fíggjarnevndin | 18.11.2020 | 17/20 |
| 3 Býráðið | 26.11.2020 | 14/20 |

## Tilráðing

| Til viðgerðar í | Fíggjarnevndini |
|---|---|
| Stutt lýsing | Uppskot til fíggjarætlan hjá Fuglafjarðar kommunu fyri 2021, sum er ein samanumtøka frá temafundinum, sum varð hildin á Dugna á Kambsdali tann 5. november í ár. Fíggjarleiðarin, saman við fyrisitingini, hevur tikið samanum rakstrar- og íløguætlan, sum býráðið umrøddi á temafundinum.<br><br>Sambært fyriliggjandi uppskoti til fíggjarætlan, so er eitt undirskot á rakstrinum á 24.435 mió. kr., sum skulu sparast á rakstrar- og íløgukontunum.<br><br>Nettoraksturin hjá kommununi fyri 2021 er mettur til umleið 71.700 mió. kr. í mun til 62.351 mió. kr. ári fyri. Íløgukostnaðurin er mettur til 53.766 mió. kr. í mun til 79.646 mió. kr. undanfarna ár.<br><br>Inntøkurnar av A+B skatti verða mettar til 67.494 mió. kr. við skattaprosenti 21,5, nøkulunda sama upphædd sum undanfarna ár. Partafelagsskatturin er mettur til 14. mió.kr.<br><br>Um so er, at skattaprosentið verður lækkað 0,5 til 21,0, so minkar metta skattainntøkan við 1.638 mió. kr. Við einari lækking av skattaprosetinum á 0,25 minkra skattainntøkan 819 tús. kr.<br><br>Tá fíggjarnevndin hevur viðgjørt hetta uppskot til fíggjarætlan, fer uppskotið aftur til nevndarviðgerð og síðani aftur í fíggjarnevndina og 2. viðgerð í býráðnum tann 26. november í ár.<br><br>**Ískoyti 17. november 2020**<br>Nevndirnar hava havt uppskoti til fíggjarætlan til endurskoðanar sæð í ljósinum av niðurstøðuni hjá fíggjarnevndini tann 11. november í ár. Avtalað varð á fíggjarnevndarfundinum 11. november, at raksturin skuldi lækka niður á umleið 65,5 mió. kr.<br><br>Aftaná nevndarviðgerðirnar er staðfest, at raksturin er lækkaður frá umleið 72 mió. kr. til 68 mió. kr., ið er ein prosentvís lækking á umleið 6% Tað vil siga, at tað mangla enn umleið 3. mió. kr. fyri at halda seg til ein rakstrarvøkstur á í mesta lagi 5% |

| | |
|---|---|
| | Tað eru serliga økini 1 og 5, sum ikki hava framt neyðugu sparingarnar enn, tí má fíggjarnevndin hyggja nærri eftir serliga hesum báðum økjum. Fíggjarleiðari og kommunustjóri meta, at tað kunnu gerast neyðugar sparingar á nevndu økjum, og hava gjørt uppskot til fleiri sparingar, sum mugu umrøðast nærri á fíggjarnevndarfundinum mikudagin 18. november.<br><br>Á íløgusíðini eru higartil spardar 4. mió. kr., men fyri at fíggjarætlanin kann javnviga uttan lántøku í 2021, so má tað sparast umleið 16 mió. kr. afturat.<br><br>**Ískoyti 19. november 2020**<br>Fíggjarnevndin samtykti í gjár uppskot til fíggjarætlan fyri 2021, og mælir býráðnum til at samtykkja fíggjarætlanina við 2. viðgerð.<br><br>Fíggjarætlanin fyri 2021 javnvigar við umleið 148,9 mió. kr. í mun til 185,6 mió. kr. í fjør.<br><br>Fíggjarnevndin gjørdi í hesum sambandi neyðugar sparingar soleiðis at miðalvøksturin í rakstrinum komandi ár er umleið 5% í mun til fíggjarætlanina undanfarna ár. Víst verður til fylgiskjal viðvíkjandi uppskoti til fíggjarætlan fyri 2021, dagfest 18. november 2020, har høvuðstølini eru hesi:<br><br>Inntøkurnar av A og B skatti verða mettar til umleið 66,700 mió. kr., við einum skattaprosenti á 21,25, ið er umleið tað sama sum nettoraksturin. Fíggjarnevndin mælir til at lækka skattaprosenti 0,25. Partafelagsskatturin er mettur til 14 mió. kr., og inntøkur frá landinum til eldraøkið eru mettar til 16 mió. kr. Rakstrarkostnaðurin av eldraøkinum er fyri Fuglafjarðar kommunu hækkaður umleið 1,5 mió. kr. í mun til í fjør.<br><br>Inntøkur í mun til sølu av grundstykkjum eru mettar til 6 mió. kr.<br><br>Nettoíløgurnar eru mettar til umleið 37,4 mió. kr., har størstu íløgur er liðugtgerð av skúlanum, ítróttarhúsi og íbúðarbygging.<br><br>Fíggingin av rakstrinum og íløgunum er av einum mettum skattagrundarlagi á 96,7 mió. kr. og av innistandandi á 15.8 mió. kr.<br><br>Í fíggjarætlanini fyri 2021 verður ikki lagt upp til at økja um skuldina við at taka upp lán, men at klára raksturin uttan lántøku í mun til fyriliggjandi inntøkumetingar.<br><br>Rentuútreiðslurnar í 2021 verða mettar til 3,4 mió. kr. og ætlanin er at gjalda 5 mió. kr. í avdráttum. |
| Bakgrund | Umrøða og samanumtøka av uppskoti til fíggjarætlanin hjá Fuglafjarðar kommunu fyri 2021 við støði í, at býráðið umrøddi fíggjarætlanina á temadegnum 5. november í ár |
| Grundarlag | • Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt |

| | | | |
|---|---|---|---|
| | **Kommunustýrislógin**<br>• Møgulig fylgiskjøl<br>**Uppskot til fíggjarætlan hjá Fuglafjarðar kommunu fyri 2021 við støði í temafundi býráðsins 5. november í ár** | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | Ja | Ja |
| | Umsitingarligar | Ja | Ja |
| Tilmæli | Fyrisitingin v/borgarstjóra, kommunustjóra og fíggjarleiðara mæla til, at fíggjarnevndin ger neyðugar tillagingar í rakstrar- og íløgukontum í fyriliggjandi uppskoti til fíggjarætlan fyri 2021 | | |
| Dagf | 10/11-2020 | | |

**Fíggjarnevndin 11. november 2020**
Fíggjarnevndin staðfesti, at ein hækking í rakstrarkostnaðinum frá 2020 til 2021 á 15% er alt ov nógv, og tí samtykti fíggjarnevndin einmælt, at rakstrarkostnaðurin komandi ár kann verða í mesta lagi 5%. Fíggjarnevndin samtykti í hesum sambandi, at hvør einstøk nevnd finnur sparingar soleiðis at tær svara til ein vøkstur á í mesta lagi 5% í mun til avsetingina fyri 2020. Í mun til íløgukostnaðin samtykti ein einmælt fíggjarnevnd, at íløguætlanirnar hjá nevndunum mugu endurskoðast, og har tað ber til, mugu hesar strekkjast yvir nøkur fíggjarár. Fyri at raka karmarnar, og uttan at taka lán, mugu íløguynskini skerjast við 18. mió. Kr.

**Fíggjarnevndin 18. november 2020**
Fíggjarnevndin gjørdi neyðugar sparingar í mun til tann rakstrar- og íløgukostnað á fíggjarætlanini fyri 2021, sum nevndirnar hava ásett. Fíggjarnevndin mælir í hesum sambandi býráðnum til at samtykkja ein nettorakstur á 66,7 mió. kr., eina nettoíløgu á 37,4 mió. kr. og rentuutreiðslur á 3,4 mió. kr. Avdráttirnir av lánum er 5 mió. kr. Miðalvøksturin í rakstrinum er umleið 5% í mun til fíggjarætlanina undanfarna ár. Rakstrar- og íløgukostnaðurin verður fíggjaður av einum mettum skattagrundarlagi á umleið 96,7 mió. kr. umframt 15,9 mió. kr. í innistandandi peningi. Fíggjarætlanin í 2021 javnvigar við 148.9 mió. kr. í mun til 185,6 mió. kr. í fjør. Ein samd fíggjarnevnd mælir samstundis býráðnum til, at lækka skattaprosenti 0,25, til 21,25.

**Býráðið 26. november 2020**
Broytingaruppskot frá Sigurð Simonsen, sum mælir býráðnum til at lækka skattaprosentið niður á 21 og hækka barnafrádráttin upp á kr. 8.000,-, sum skal fíggjast av øki 7 viðvíkjandi renovatiónini. Atkvøtt varð fyrst um broytingaruppskotið. 2 atkvøður fyri: Sigurð Simonsen og Árant Berjastein. 5 atkvøddu ímóti: Sonni á Horni, Ólavur Larsen, Eivind Breiðaskarð, Kristian Petersen og Magni Jøkladal. 2 atkvøður blankar: Eyðun á Lakjuni og Edva Jacobsen. Broytingaruppskotið fall.

Býráðið samtykti einmælt (9-0), at fylgja tilmælinum frá fíggjarnevndini, og góðkendi við 2. viðgerð fíggjarætlanina hjá Fuglafjarðar kommunu fyri 2021.

Fundurin lokin kl. 20:05.

Gerðabók lisin og góðkend

Sonni á Horni

Eivin Breiðaskarð

Kristian Petersen

Edva Jacobsen

Ólavur Larsen

Eyðun á Lakjuni

Árant Berjastein

Magni Jøkladal

Sigurð Simonsen